# gafiski í Irmingarhavinum



*Hetta er eitt av teimum mongu skipunum, sum í hesum døgum dríva ólógliga ránsveiði eftir kongafiski í altjóða sjógvi. Skipini hava als ongan "identitet", sum er ólógligt sambært NEAFC og NAFO-reglum*

verða skipini, sum fiska undir skipaðum viðurskiftum, regluliga kannaði á fiskifeltinum.

– Herfyri ljóðaði, at umhvørvisfelagsskapir hava í hyggju at leita sær í Irmingarhavið at hyggja upp á ránsveiðina, men eg haldi, at hetta er ein trupulleiki, sum myndugleikarnir í londunum áttu at kunnað loyst í felag. Men tíverri vísir tað seg ikki, at so er.

## Vónsvikin skipari

Sonny sigur, at hann er vónsvikin av teimum londum, sum umsita tilfeingið í Irmingarhavinum, at tey soleiðis lata hesi skip gera feigdina um seg í einum annars skipaðum øki.

– Og púrasta burtur við er tað, at veitarar í hesum londum gera tað møguligt hjá hesum skipum at halda fram at fiska ólógliga.

Skiparin á Ennibergi heldur, at tað minsta, sum veitararnir mugu krevja, er at fáa at vita, hvørji hesi skip eru, og hvør stendur aftanfyri tey.

– Eg eri vónsvikin av, at føroysku myndugleikarnir saman við øðrum londum í felagsskapinum ikki taka stig til at steðga hesi ólógligu veiði í Irmingarhavinum, sigur Sonny Johannesen.




*– Vit hava eina kvotu at halda okkum til, og tá ið hon er uppi, noyðast vit at gevast. Hinvegin halda skipini, sum fiska ólógliga, fram at fiska, sigur Sonny Johannesen, sum stýrir fyri, at hetta fer at gera enda á kongafiskastovninum í Irmingarhavinum*